# Ein áheitan á løgmann



JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður í norðoyggjum

***Løgmaður var samdur við mær, at neyðugt nú er at fáa gjørt nakað við desentralisering av almennum stovnum og tað vóru tíggju tingfólk eisini, sum tóku lut í orðaskiftinum, tá eg setti løgmanni fyrispurningin 7. desember í fjør.***

Hósdagin 7. desember í fjør, setti eg løgmanni soljóðandi fyrispurning, samstundis, sum eg hevði nakrar grundgevingar fyri fyrispurninginum: "*Heldur løgmaður ikki, at tíðin er komin, har vit skulu fáa gjørt upp í hesum málum og stovnum, við at desentralisera partar av hesum økjum, so vit fáa fleiri fyrimunir: Bíligari og tryggari rakstur, lægri høliskostnað og eina effektivari arbeiðsgongd. Hvat ætlar løgmaður at fyritaka sær í hesum málum, nú visjón 2015 er fullvirkin?*"

Fyrst er at siga, at løgmaður var ikki heilt samdur við mær um mínar grundgevingar, hóast hann seinni í sínum svari gav mær rætt, tá eg nevndi um ringa standin á Landssjúkrahúsinum og á Vinnuháskúlanum, sum vóru bert tvey av fleiri dømum, sum eg gav. Nakað kann vera rætt í tí, men lat tað fara!

Eg fari at endurgeva partar av áhugaverda svari løgmans, sum eg eisini trúgvi er hansara hjartans meining. Hann tók soleiðis til: "*Nú vóni eg, at eg svari uppá tann rætta spurningin, tí soleiðis sum eg lesi henda spurningin, so gongur hann uppá at desentralisera partar av stovnum.......*"

### Tíverri bert tos

Henda staðfesting hansara er bæði rótt og rímilig, og sjálvur haldi eg, og fleiri við mær, at hesin táttur í okkara menning er sera viðkomandi nú visjón 2015 er fullvirkin.

Víðari sigur løgmaður í svarðinum: "*Sjálvur haldi eg, at desentraliseringartosið er áhugavert. Tíverri mugu vit ásanna, at tað bert hevur verið við tos, tað hevur verið lítil handling aftanfyri hetta at desentralisera. Men táið man tosar um at desentralisera, so má man hava røttu motivatiónina, tey røttu argumentini, hví man vil desentralisera*".

Hetta er bæði rætt, satt og væl sagt og hóast staðfestingina hjá løgmanni, "at tað bert hevur verið við tos" higartil, eru møguleikar enn at fara í holt við hetta.

### Meiri víðfevnt ment samfelag

Út frá hesi seinastu grein av áðurskrivaðu fýra greinum, har eg vísti á nakrar veruligar samfelagsligar staðfestingar, verður heitt á løgmann um at taka stig til, saman við samgonguni, at ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til bygnaðarbroytingar, at áðurgjørd arbeiði og úgreiningar verða løgd sum grundarlag, og at hetta arbeiði verður útint innan tríggir mánaðir eru farnir.

Lagt eigur vera afturat, sum er sera viðkomandi, at í samband við fyrispurningin, vóru ikki færri enn tíggju tingfólk, sum gjørdu viðmerkingar, sum øll vóru samd um, at tað nú átti at verða gjørt nakað, tí samfelagið var so skeiklað av lagi, og neyðugt var, at vit m.a. fáa meiri dynamikk, lægri kostnað, hølisleigur og eitt sunnari og meiri víðvfevnt ment samfelag.

Tí vóni eg, at eg, at gingið er áheitanini og svarinum frá løgmanni á møti.

(Seinasta av íalt fimm greinum um sama evnið?

# Takið rætta avgerð um »skeiva« húsið

JÓHANN MORTENSEN

Mest umrødda húsið í Havn í dag er Skeiva Pakkhús. Í kvøld skal Tórshavnar býráð avgera, um Tórshavnar kommuna skal ogna sær hesi stóru húsini, sum hava ein høgan og breiðan skjøldur í móti Vestaruvág.

Vit hava eitt væl varðveitt umhvørvi við vánna. Eitt maritimt umhvørvi, sum mong misunna okkum: Múlers Pakkhús, Skeiva Pakkhús, Neystið við Lágukei, Høgukei, Lágukei og Stabban, har Westward Ho og Norðlýsið liggja.

Á hinum arminum hava vit søguliga Tinganes og varðveiddu bygningarnar har.

Tað var framskygt, tá Tórshavnar Havn í sekstiárunum keypti Múllers Pakkhús, sum tá var um at forfella. Hóast tað enn ikki er liðugt umvælt, er tað nógv umbiðið til framsýningar, konsertir, móttøkur og onnur tiltøk. Røddir vóru ímóti, at havnin ognaði sær pakkhúsið hjá Múllersfólkunum, men í dag munu tey flestu fegnast.

Skeiva Pakkhús kann brúkast til nógv ymiskt, sum tørvur er á. Serliga á mentanarøkinum ella í ferðavinnuhøpi: sjó- og bátasavn, íverksetarahús, matstova ella pubb hjá einskildum at reka, list ella konserhøli o.s.fr. Húsið hevur fýra hæddir. Bara hugflogið setir mørk. Tað er ikki nøkur forðing, um kommunan keypir húsið. Tvørturímóti. Tað er ein avbjóðing. Og ein uppaftur betri møguleiki at gera eina heildarætlan fyri Skálatrøð og økið við Vestaruvág

Sjálvandi skulu vit seta spurnartekin, tá ein kommuna ger eina íløgu, sum kostar oman fyri 12 milliónir krónur. Vit eiga at spyrja, um hon gagnar kommunala felagsskapinum ella ikki.

Tá Tórshavnar býráð avgjørdi at seta smiðuna úti í Grind – Smiðuna í Lítluvík – í stand fyri einar 500.00 krónur vóru eisini nógvar dómadagsrøddir frammi. Tá var eisini rópt upp um kommunalt oyðsl. Ídag munnu tey flestu fegnast um, at gamla smiðan varð sett í stand og gjørd til framsýningarhøli. Mær vitandi er hon umbiðin hvørja viku á árinum.

### Tá ráddu hugsjónarmenn fyri borgum!

Bæði býráðspolitikkarar, einskildar fyritøkur og einstaklingar royna at fáa Tórsgøtu livandi aftur. Tað er partvíst eydnast við Posthúskjallaranum, Hvonn og Miðlahúsinum, sum hevur verið nýskapandi og hýsir nógvum áhugaverdum virksemi.

Eisini verður miðað ímóti at seta gamla vaskaríið, ella gomlu sápufabrikkina, hjá Mjólkaforsýningini í stand. Húsini eru søgulig og vóru pakkhús hjá kongaliga handlinum í síni tíð. Hava vit virðing fyri søgu, gomlum bygningum og einum hugnaligum umhvørvi seta vit – kommunan – tey sjálvandi í stand, so tey verða eitt prýði fyri býin.

Eydnast tað at fáa meiri lív og virksemi í Tórsgøtu, og kanska eisini í húsunum undir Bryggjubakka, fáa vit eina meiri livandi Vestaruvág. Eydnast tað so eisini at fríðka Skálatrøð, og kanska bygt okkurt fram við berginum, fáa vit eitt spennandi samanhangandi øki úr Tinganesi, inni í Vágsbotn, fram við Skálatrøð og yvir til Múllers Pakkhús. Eitt øki við sjarmu og søguligum virðum.

Tørvur er altíð á ymiskum í eini kommunu. Ikki minst á vælferðar- og trivnaðarøkinum – pláss á ellisheimum, skúlahølum, nýggjum gongubreytum, dagstovnaplássum, kloakkum o.s.fr. Tað er altíð lætt at seta slíkt upp í móti einum uppskoti at keypa eitt pakkhús fyri 12 milliónir krónur. Men viðhvørt er neyðugt at hugsa øðrvísi.

Ofta hava politikkarar í býnum hugsað stórt. Eitt nú tá teir fyri meira enn 100 árum síðani útvegaðu kommunini eitt stórt øki niðan ímóti Gundadali til viðarlund – at gróðurseta trøð í staðin fyri at brúka øki til seyð, eplaveltur ella neyt!!! Tey flestu mugu sanna, at hetta var framskygt og hevur verið til stóran trivnað.

Eitt annað dømi er býráðssamtyktin í sjeytiárunum at gera svimjihøllina ovarliga í Gundadali fyri einar 40 milliónir krónur. Tá vóru eisini dómadagsrøddir frammi, tí hetta megnaði kommunan ikki. Ein býráðspolitikkari fall helst av hesi avgerð, samstundis sum ein annar helst kom inn, tí hann var ímóti. Í dag er svimjihøllin – sum ein av setursmonnunum mælti til at kalla Sundhøllina eftir gamla orðinum at synda og sundhylur – eitt tað besta aktivið í kommununi.

Vit kunnu eisini nevna, at býráðspolitikkarar hugsaðu stórt, tá teir lótu navnframa rithøvund og listarmann okkara, William Heinesen, prýða kommunuskúlan, tá hann varð bygdur í fimmtiárunum. Tá vantaðu okkum í Havnini bæði drekkivatn, barnagarðspláss og ikki minst arbeiðspláss. Kundu vit hugsað okkum kommunuskúla-auluna uttan veggjamálningarnar? Nei, og teir hava ment hugflogið og áhugan fyri list hjá mongum av okkum, sum gingu í hesum skúla.

Kostnðaurin er høgur, men hann trýstir ikki húsaprísin í Havnini, sum onkur vil vera við. Tað klára fíggingarstovnar. 12 milliónir krónur er ikki meira enn eini fimm sethús kosta ella knappar tvær ferðir tað, eini hús við Eystaruvág vórðu seld fyri nú í vetur.

Hugsið nú stórt einaferð afturat, tí Skeiva Pakkhús kann hýsa nógvum virksemi, sum kann verður til gagns fyri tey, sum her búgva, ella vitja høvuðsstaðin.

# Nú skal oyðslast, Heðin

HILMAR SIMONSEN



Skálkarnir sum undan seinasta løgtingsvali manipuleraðu vallýsingina hjá Heðini Mortensen "Nú skal arbeiðast" til "Nú skal lánast" hugsaðu seg ikki nóg væl um. Har burdi staðið "Nú skal oyðslast". Borgarstjórin søplar skattaborgarans pengar burtur til gamlar bygningar í staðin fyri at tryggja vælferðina.

Á seinasta løgtingsvali, tann 20. januar 2004, stillaði núverandi borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, upp fyri Sambansflokkin. Herrópið hann nýtti á valplakatum og heimasíðu síni undir liðini av einum føroyskum flaggi var "Nú skal arbeiðast".

Onkur illavorðin teldusnillingur sá ein fress í hesum og broytti herrópið hjá Heðini til "Nú skal lánast", har Heðin varð avmyndaður við einum donskum flaggi. Henda manipulatiónin varð gjørd talgild og løgd á internetið, og við at klikkja inn á leinkjuna kom ein inn á eina heimasíðu við navninum www.spik.dk. Hesa søguna finnur tú við at leita í greinasavninum hjá fjølmiðlunum.

Hetta átakið tóktist illavorðið í eygunum á mongum, og eisini undirritaða, og Heðin gjørdi heldur ikki mætari enn at melda málið til løgregluna, millum annað tí at anonymu skálkarnir høvdu brúkt lýsingina hjá sær, sum hann hevði goldið fyri, sum útgangsstøði til manipulatiónina.

### Í býráðið at oyðsla

Á býráðsvalinum í november 2004 varð Heðin Mortensen valdur inn í høvuðsstaðnum á sambandslistanum, men eftir eina uppgerð við Sambandsflokkin skifti Heðin yvir til Javnaðarflokkin og gjørdist einki minni enn býráðsformaður.

Fleiri krimpaðu tær yvir, at Heðin gjørdist borgarstjóri, tí hann ber orð fyri at vera – ja, orsaka máliskuna – eitt oyðiland!

Men í dag mugu borgarar í Tórshavnar kommunu bert ásanna, at hesi illgrunasomu fingu so dyggiliga rætt. Heðin er eitt satt oyðiland, tað hevur hann víst fleiri ferðir millum annað við keypinum av Degns Hus í januar 2006 fyri 5 mió. krónur, sum var áðrenn húsaprísirnir komu upp á tað ørandi støði, teir eru nú.

Nú ætlar borgarstjórin sær enn einaferð at fara djúpt niður í kommunukassan eftir einki minni enn 12,5 mió. krónum til at keypa enn ein gamlan skinklutan bygning, Skeivapakkhús, til gud viti hvat. Hendan býráðssamgongan dámar væl fastar ognir og hevur keypt nógvar av slagnum fyri okursprísir.

Sjón gongur fyri søgn at borgarstjórin velur at søpla okkara hart forvunnu skattakrónur burtur til fjant og fjas í staðin fyri til dømis at tryggja barnafamiljum plássgaranti til vøggustovu. Hópur av smábarnafamiljum stendur á bíðilista til at fáa børn síni ansað, so tey sleppa til arbeiðis, men mugu smyrja seg við toli, tí mangul er upp á vøggustovupláss. Tað eru sikkurt nógv onnur vælferðarøki, sum eisini liggja forsømd.

Alt ímeðan dusar borgarstjórin sær við milliónum av skattaborgarans krónum til at keypa avoldaðar og skirvisligar bygningar í kommunini fyri 10-talsmilliónir krónur! Hvat verður tað næsta – uttan iva ein trivalig skattahækking!

